LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 18. juni 2025
J.Nr.: LUM-16- 24/21405-61
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

# Álit
um málsviðgerðina hjá barnaverndartænastuni í Tórshavnar kommunu av einum barnaverndarmáli

## 1. Niðurstøða umboðsmansins

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu frá einum advokati, vegna sín klient, um málsviðgerðina hjá barnaverndartænastuni í Tórshavnar av einum barnaverndarmáli. Klagan var í fyrstu syftu lokað, tí umboðsmaðurin metti, at hóast barnaverndartænastan í einum føri ikki hevði hildið lógarásettu eftirmetingarskylduna í barnaverndarlógini, so hevði barnaverndartænastan ikki latið málið koma í drag vegna drál. Síðani gjørdi umboðsmaðurin av at opna málið aftur, tí upplýsingar og frágreiðingar, ið klagarin og barnaverndartænastan aftaná høvdu latið umboðsmanninum, vístu, at barnaverndartænastan enn einaferð ikki hevði hildið sína lógarásettu eftirmetingarskyldu. Harafturat hevði barnaverndartænastan ikki svarað umboðsmanninum rættstundis í sambandi við klagumálsviðgerðina. Umboðsmaðurin gav barnaverndartænastuni eina átalu fyri málsviðgerðina av hesum máli og fyri málsviðgerðina í sambandi við klagumálsviðgerðina hjá umboðsmanninum.*

## 2. Málslýsing

Tann 17. september 2024 klagaði A, advokatur, vegna sín klient, til umboðsmannin um málsviðgerðina hjá barnaverndartænastuni í Tórshavnar kommunu av einum barnaverndarmáli.

Tann 26. februar 2025 lokaði umboðsmaðurin klaguna, sambært § 6, stk. 4 í umboðsmanslógini (løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000). Skrivið, ið sent var klagaranum í hesum sambandi, verður ikki endurgivið í hesum áliti.

Í skrivinum staðfesti umboðsmaðurin, at soleiðis sum málið var lýst, hevði umboðsmaðurin samanumtikið ikki funnið orsøk at halda, at barnaverndartænastan í Tórshavnar kommunu hevði latið málið komið í drag vegna drál. Barnaverndartænastan hevði viðurkent, at hon ikki hevði hildið lógarfestu eftirmetingarskylduna í § 16, stk. 2 í barnaverndarlógini (løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd), tá eftirmetingin av málinum, ið av røttum skuldi verið í mai 2024, varð framd í august 2024. Umboðsmaðurin minti barnaverndartænastuna um framyvir at halda lógarásettu eftirmetingarskylduna. Umboðsmaðurin gav sær eisini far um, at gongd alla tíðina hevði verið í málinum, og at barnaverndartænastan hevði boðað klagaranum frá, at ein eftirmeting skuldi verða aftur í februar 2025 við tí endamáli at fáa eina endaliga eftirmeting av málinum.

Tann 1. apríl 2025 sendi klagarin fráboðan til umboðsmannin, har hann m.a. boðaði frá, at hann ella klientur hansara framvegis onki høvdu frætt frá barnaverndartænastuni í Tórshavnar kommunu.

Eftir hetta fór umboðsmaðurin undir aftur klagumálsviðgerðina og boðaði barnaverndartænastuni í Tórshavnar kommunu frá, at klagumálið aftur var opið.

## 3. Viðmerkingar frá myndugleika og klagara

Tann 2. apríl 2025 sendi umboðsmaðurin soljóðandi skriv til barnaverndartænastuna í Tórshavnar kommunu:

> **“Uppfylging viðv. klagu frá A, dagfest 17. september 2024**
>
> Í skrivi frá Løgtingsins umboðsmanni, dagfest 26. februar 2025, varð barnaverndartænastan í Tórshavnar kommunu endurgivin soleiðis, í frágreiðing dagfest 24. januar 2025:
>
> > “Tað hevur ikki verið møguligt at gjørt endaligu metingina av málinum áðrenn ársenda 2024, orsaka av arbeiðstrýsti. Tí verður framvegis mett tørvur á einari endaligari eftirmeting av málinum. Ætlanin er at innkalla foreldrini til hetta í feb. 2025.”
>
> A, advokatur, hevur í telduposti til umboðsmannin, dagfestur 2. apríl 2025, gjørt vart við, at klientur hansara ... framvegis onki hevur hoyrt frá barnaverndartænastuni í Tórshavnar kommunu.
>
> Umboðsmaðurin fer at biðja barnaverndartænastuna í Tórshavnar kommunu um at greiða umboðsmanninum frá, nær barnaverndartænastan fer at innkalla foreldrini, soleiðis sum greitt var frá fyri umboðsmanninum, og um orsøkina til, at hettar ikki varð gjørt í februar 2025.
>
> Frágreiðingin skal vera umboðsmanninum í hendi skjótast gjørligt.”

Tann 11. apríl 2025 minti umboðsmaðurin barnaverndartænastuna í Tórshavn á málið.

Tann 14. apríl 2025 sendi barnaverndartænastan í Tórshavn kunning til umboðsmannin um, at foreldrini vóru boðin til samrøðu í mai 2025.

Tann 23. apríl 2025 sendi umboðsmaðurin barnaverndartænastuni í Tórshavn soljóðandi skriv:

> **"Viðvíkjandi frágreiðing, dagfest 14. apríl 2025**
> ...
> Í frágreiðingini frá barnaverndartænastuni í Tórshavnar kommunu, dagfest 14. apríl 2025, verður ikki greitt frá um orsøkina til at foreldrini ikki vóru innkallaði í februar 2025.
>
> Umboðsmaðurin fer at biðja barnaverndartænastuna í Tórshavnar kommunu um at greiða frá, um orsøkina til at foreldrini ikki vóru innkallaði í februar 2025.
>
> Umboðsmaðurin fer eisini at biðja barnaverndartænastuna í Tórshavnar kommunu um at greiða frá, nær seinasta eftirmetingin sambært barnaverndarlógini er gjørd?
> ...
> Umbidna frágreiðingin skal verða umboðsmanninum í hendi, í seinasta lagi tann 30. apríl 2025."

Tann 9. mai 2025 minti umboðsmaðurin barnaverndartænastuna í Tórshavn á málið.

Tann 14. mai 2025 fekk umboðsmaðurin frágreiðing og viðkomandi skjøl frá barnaverndartænastuni í Tórshavn. Frágreiðingin verður ikki endurgivin í hesum áliti, men er tikin við í viðgerðina, í tann mun tað er mett viðkomandi. Umboðsmaðurin fekk í hesum sambandi at vita, at næst seinasta eftirmetingin varð framd í august 2024, ið, sambært § 16, stk. 2 í barnaverndarlógini, var tríggjar mánaðir ov seint, og at seinasta eftirmetingin var í mai 2025, nærum tríggjar mánaðir ov seint.

Tann 12. juni 2025 kunnaði umboðsmaðurin partarnar um, at umboðsmaðurin var í gongd við endaligu viðgerðina av málinum.

## 4. Niðurstøða

Viðgerð mín av hesum máli snýr seg um málsviðgerðina hjá barnaverndartænastuni í Tórshavnar kommunu av málinum aftaná niðurstøðu mína, dagfest 26. februar 2025, ið er endurgivin undir punkt. 2 undir heitinum Málslýsing, og málsviðgerðina í sambandi við klagumálsviðgerðina hjá mær.

Hóast barnaverndartænastan boðaði mær frá, at endalig eftirmeting fór at verða gjørd í málinum í februar 2025, so varð eftirmeting ikki gjørd fyrrenn í mai 2025.

Barnaverndartænastan ásannar í frágreiðingini til mín, dagfest 14. mai 2025, at tað ikki var nøktandi, at umrødda eftirmetingin ikki varð framd í februar 2025, sum annars varð upplýst. Barnaverndartænastan hevur í frágreiðingini sum høvuðsorsøk ført fram, at talan hevur verið um stórt arbeiðstrýst hjá stovninum, ið hevur gjørt, at málið kom í drag.

Lógarásetta eftirmetingarskyldan í § 16, stk. 2 í barnaverndarlógini, er soljóðandi:

> **"§ 16.** …
> *Stk. 2.* Barnaverndarnevndin skal í seinasta lagi 3 mánaðir eftir, at ein fyriskipan er sett í verk, meta um, hvørt fyriskipanin virkar eftir ætlan, ella um neyðugt er at seta nýggjar fyriskipanir í verk, og um ætlanin eftir § 47 skal broytast. Barnaverndarnevndin skal eftir hetta meta um fyriskipanirnar minst 6. hvønn mánað.
> ..."

Serligu viðmerkingarnar til § 16, stk. 2, ið eru at finna í løgtingslóg nr. 52 frá 8. mai 2012 um broyting í løgtingslóg um barnavernd, ljóða m.a. soleiðis:

> "Barnaverndarnevndin hevur skyldu til at hava eftirlit við, hvussu bæði barnið og foreldrini hava tað, eftir at ein fyriskipan er sett í verk. Í hesum sambandi hevur barnaverndarnevndin skyldu til at meta um, hvørt tann ella tær fyriskipanir, ið eru settar í verk, virka eftir ætlan ella eiga at broytast, og um ætlanin eftir § 47 skal broytast. Endamálið við eftirlitinum er at tryggja, at fyriskipanin alla tíðina gagnar barninum og foreldrunum, og stuðlar uppundir at náa teimum málum, ið eru sett, og at tryggja, at fyriskipanin ikki heldur fram, um endamálið er rokkið, ella fyriskipanin ikki longur tænir endamálinum.
>
> Barnaverndarnevndin hevur skyldu til at hava eftirlit so ofta, tað er neyðugt í tí einstaka málinum. Málini eru ymisk, og tí er eisini ymiskt, hvussu ofta tørvur er á at hava eftirlit. § 16 ásetur minsta mark fyri, hvussu ofta eftirlit skal fremjast.
> ..."

Ein myndugleiki hevur skyldu at skipa síni viðurskifti soleiðis, at eitt nú stór arbeiðsbyrða ella sjúka í starvsfólkahópinum nerva vanligu málsviðgerðina hjá myndugleikanum sum minst. Hetta kann eitt nú gerast við at hava greiðar mannagongdir kring málsviðgerð, kunning og skjalføring í sambandi við málsframhald av málum, ið eru til viðgerðar, soleiðis at mál ikki liggja ella detta niðurfyri. Hetta hevur serligan týdning, har myndugleikin er álagdur at halda lógarásettar freistir í mun til sína málsviðgerð.

Í hesum sambandi er umráðandi at undirstrika endamálið við lógarásettu eftirmetingarskylduni. Eftirmetingin skal tryggja, at fyriskipanin alla tíðina gagnar barninum og foreldrunum og stuðlar undir at náa teimum málum, ið eru sett, og at tryggja, at fyriskipanin ikki heldur áfram, um endamálið er rokkið, ella fyriskipanin ikki longur tænir sínum endamáli. Tað er tí sera týdningarmikið, at eftirmetingin í minsta lagið verður gjørd innan teir seks mánaðirnar, sum

lógin ásetur, eins og tað í summum málum krevst títtari eftirlit, við tað at mál og tørvur kunnu vera ymisk.

Sambært upplýsingunum í málinum, átti barnaverndartænastan í Tórshavnar kommunu at gjørt eina eftirmeting sambært § 16, stk. 2 í barnaverndarlógini í seinasta lagi í februar 2025. Eftirlitið varð tó ikki framt fyrrenn í mai 2025.

Eg haldi, at orsøkin, ið barnaverndartænastan í Tórshavnar kommunu hevur nýtt sum grundgeving, ikki kann nýtast sum umberandi orsøk fyri, at eftirmetingin ikki varð framd til tíðina og nærum tríggjar mánaðir ov seint. Vísandi til endamálið við lógarásettu eftirmetingarskylduni er tað av stórum týdningi, at lógarásetta freistin á seks mánaðir verður hildin.
Soleiðis sum hetta málið er lýst, hevur barnaverndartænastan, í tveimum førum ikki hildið lógarásettu eftirmetingarskylduna í § 16, stk. 2. Hetta haldi eg verða átaluvert.

Undir klagumálsviðgerðini í sambandi við, at eg bað barnaverndartænastuna í Tórshavnar kommunu um at geva mær eina frágreiðing um málið, noyddist eg í tveimum førum at minna barnaverndartænastuna á málið. Hetta haldi eg ikki vera nøktandi.

Vísandi til omanfyristandandi fari eg samanumtikið at geva barnaverndartænastuni í Tórshavnar kommunu eina átalu fyri málsviðgerðina av hesum máli og fyri málsviðgerðina í sambandi við klagumálsviðgerðina hjá mær.

Eg taki tó til eftirtektar at eftirmetingin nú er framd, og at gongd er í málinum.

Hanna Vang

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður